UTTAN ÚR HEIMI

## Bush fekk eykajáttan

Senatið og umboðsmannatingið í USA hava nú játtað einari umsókn frá George W. Bush, forseta um 578 milliardir krónur í eykajáttan til kríggið í Irak og tiltøk ímóti yvirgangi.

Umsóknin varð samtykt við stórum meiriluta. Í senatinum atkvøddu 93 senatorar fyri og eingin ímóti, og í umboðsmannatinginum tóku 414 umdir við umsóknini, meðan tólv atkvøddu ímóti.

Men umboðsmannatingið broytti tað upprunaliga uppskotið hjá forsetanum, soleiðis at fyritøkur í Fraklandi, Týsklandi og Russlandi skulu ikki fáa part av amerikansku pengunum, sum fara til at endurreisa Irak. Hetta verður gjørt, tí tey trý londini hava verið tey harðastu ímóti álopinum á Irak. At munur er á samtyktunum ger, at málið má viðgerast eina ferð afturat, men tað verður ikki hildið, at hetta er nakar stórvegis trupulleiki. Forsetin hevur annars sagt, at málið má avgreiðast innan 11. apríl.

## Lækni leyp á við knívi

Seinnapartin hósdagin gjørdist ein kvinnuligur spanskur lækni brádliga frá sær sjálvum og stakk ein annan lækna og ein sjúkling so meint, at teir doyðu.

Sambært sponsku fjølmiðlunum stóð kvinnan og tosaði við nakrar starvsfelagar, tá hon brádliga tók ein knív og legði á felagarnar. Tað eydnaðist henni at stinga átta fólk og tvey teirra so meint, at tey doyðu.

Tann 31 ára gamli læknin hevur arbeitt á einum sjúkrahúsi í Madrid seinastu trý árini, og hon var júst komin aftur til arbeiðis eftir at hava verið sjúkrameldað vegna sinnistyngd. Starvsfólk á sjúkrahúsinum siga, at hóast hon var komin aftur til arbeiðis, var tað týðiligt, at hon var ikki frísk. Sambúgvi hennara, ein tíðindamaður, sigur, at leiðslan á sjúkrahúsinum visti, at hon var ikki frísk, men at hon kortini varð biðin um at koma aftur til arbeiðis.

## Samráðingar útsettar

ES og tey trý EFTA-londini, Noreg, Ísland og Liktinstein, hava gjørt av at halda ein steðg í samráðingunum um nýggja handilsavtalu.

ES hevur boðað frá, at samráðingarnar skulu vera lidnar fyri páskir, um tann nýggi sáttmálin skal fáa gildi 1. mai næsta ár, tá tey tíggju umsøkjaralondini koma upp í ES. Samráðingarnar hava gingið illa, tí EFTA-londini hava sýtt fyri at rinda tað, sum ES krevur fyri ein nýggjan sáttmála. Men tað er ikki tann einasti stríðsspurningurin. ES krevur, at tollur skal leggjast á fisk úr Noregi og Íslandi til tey nýggju limalondini. Skal eingin tollur rindast, krevur ES atgongd til norsku og íslendsku fiskivinnuna. Hesum  hava bæði Noreg og Ísland víst aftur.

Partarnir hava avtalað at hittast aftur hósdagin í næstu viku. Samráðingarnar millum ES og EFTA-londini byrjaðu tíðliga í januar.

## Kunngera stjórn í næstu viku

Nýtilnevndi palestinski forsætisráðharrin, Mahmoud Abbas, fer ætlandi at kunngera stjórn sína í næstu viku.

Palestinski ráðharrin í altjóða viðurskiftum, Nabil Shaath, segði í gjár, at seinastu tíðina hevur Mahmoud Abbas tingast við umboð fyri palestinararnar á Vestara Áarbakka og í Gaza-geiranum um tað komandi stjórnina.

Nabil Shaath segði, at gongst eftir ætlan fer Mahmoud Abbas at kunna aðalstjórnina í Fatahflokkinum um ta nýggju stjórnina einaferð í næstu viku.

# Sníktu seg inn í myrkrinum



*Hóast amerikanarar og bretar hava tikið seg skjótt fram seinastu dagarnar, er tað ringasta eftir, sigur herleiðslan*

*Mynd: Reuters*

**Tað var neyvan av tilvild, at streymurin fór í Bagdad fyrrakvøldið. Hildið verður, at amerikanarar sendu servandar hermenn inn í býin í myrktinum**

KRÍGGJ Í IRAK

*Árni Joensen*

Klokkan níggju hóskvøldið fór streymurin í irakska høvuðsstaðnum Bagdad, og fleiri vesturlendskir fjølmiðlar hava síðani sagt, at servandir amerikanskir og bretskir hermenn vórðu sendir inn í sjálvan býin í myrkrinum.

Hernaðarkeldur, sum bretska blaðið The Guardian hevur tosað við, siga, at fleiri smá lið av servandum hermonnum vórðu sendir inn í býin, stutt eftir at ljósið var farið. Eitt annað bretskt blað, Financial Times, vísir á, at hetta var fyrstu ferð undir krígnum, at Bagdad misti streymin, og at hernaðarkeldur stut eftir váttaðu, at servandir hermenn eru í býnum.

Tey bretsku bløðini siga, at amerikanararnir bumbaðu elveitingina hóskvøldið. Tað avsannaði amerikanska herleiðslan í Qatar, men eygleiðarar siga, at avsannanin var soleiðis orðað, at tað er væl hugsandi, at tað var fregnartænastan CIA, sum sleit streymin. Undir krígnum í Kosovo bumbaðu amerikanarar elveitingina, og tað elvdi til atfinningar, tí sjúkrahúsini lógu í streymloysi.

Summir fjølmiðlar halda kortini, at tað vóru iraksku myndugleikarnir, sum sløktu streymin í høvuðsstaðnum, og at amerikansku og bretsku hermenninir gjørdu sær dælt av hesum møguleikanum at sleppa inn í býin. Tað er ikki heilt greitt, hvør uppgávan hjá hermonnunum er, men hildið verður, at teir skuldu kanna, hvussu sterk verjan í Bagdad er.

Samstundis ávarar amerikanska herleiðslan um, at kríggið er minni enn so liðugt enn, og at tað ringasta framvegis er eftir.

# Veruligur vandi fyri kríggi í Norðurkorea

**Ein sendimaður hjá ST, sum er í Norðurkorea, sigur, at kreppan millum Norðurkorea og USA kann enda við kríggi**

KRÍGSVANDI

*Árni Joensen*

- Tað er avgjørt vandi fyri, at ósemjan millum Norðurkorea og USA kann enda í einari veruligari kreppu. Sjálvur dugi eg ikki at síggja, at kríggj er neyðugt, og harafturat er tað trupult at ímynda sær eitt kríggj, um hugsað verður um avleiðingarnar, men kortini er veruliga vandi fyri tí, sigur ST-sendimaðurin í Norðurkorea, Maurice Strong.

Sjálvur heldur hann ikki, at amerikanarar hava hug at leypa á Norðurkorea, og hann hevur heldur ikki fingið ta uppfatan, at norðurkoreanar vilja hava kríggj. Men hinvegin heldur hann vanda vera fyri, at álitið millum tey bæði londini verður so lítið, at tað kann elva til kríggj.

Kreppan millum USA og Norðurkorea versnaði munandi, tá norður-koreansku myndugleikarnir koyrdu umboðini hjá altjóða kjarnorkustovninum IAEA av landinum og lótu eitt kjarnorkuverk uppaftur, eftir at stjórnin í Pyongyang hevði viðgingið, at landið hevði roynt at fáa sær kjarnorkuvápn.

Norðurkoreanar bera ótta fyri, at amerikanarar fara at leggja á landið, tá teir eru lidnir í Irak. ST-trygdarráðið fer at viðgera Norðurkorea tann 9. apríl, og Marurice Strong sigur, at tað kann koma upp á tal at seta tiltøk í verk ímóti landinum. Norðurkorea hevur sagt, at møgulig tiltøk verða mett sum ein krígsavbjóðing.

Maurice Strong heldur tó ikki, at talan verður um nøkur tiltøk enn, tí hann væntar ikki, at londini í trygdarráðnum kunnu semjast um tað.



UTTAN ÚR HEIMI

# Bush: Guð hevur valt meg



*George W. Bush heldur seg hava fingið eitt kall frá Guði at stríðast ímóti tí ónda í heiminum*

*Mynd: Reuters*

**Kríggið í Irak hevur broytt George W. Bush, forseta. Hann er vorðin ótolin og innisælur og heldur, at Guð hevur valt hann at leiða USA í einari truplari tíð**

*Árni Joensen*

- Tú sært tað í eygum hansara, og tað hoyrist á rødd hansara. Eg eri bangin um hann, sigur ein av næstu vinmonnum forsetans við blaðið USA Today.

Blaðið hevur tosað við fleiri av teimum, sum dagliga hava við forsetan at gera, og tey eru á einum máli um, at Bush er broyttur tær seinastu vikurnar. Hann øsir seg upp, um fjølmiðlarnir koma við frágreiðingum, sum honum ikki hóvar, ella tá fjølmiðlarnir og fyrrverandi generalar seta spurningar um kríggið. Forsetin skemtar eisini minni enn fyrr, og hann er heldur ikki so léttur at koma í samband við longur. Fyrr var hann altíð til reiðar at tosa við sínar medarbeiðarar, men í dag spyr hann fyrst, um tað er neyðugt.

### Eitt kall frá Guði

Tað, sum serliga hevur vakt ans, og sum hevur elvt til stúran, er, at Bush hevur fingið ta uppfatan, at hann stríðist ímóti tí ónda í heiminum, og at Guð hevur valt hann til at leiða hetta stríðið fyri størri frælsi í heiminum.

- Bush heldur, at hann hevur fingið eitt kall frá Guði um at leiða tjóðina. Hann tekur avgerðir, sum broyta søguna, sigur Dan Evans, sum er fíggjarmálaráðharri í stjórnini hjá Bush og ein av bestu vinmonnum forsetans.

Fyrradagin helt Bush røðu fyri hermonnunum á Lejune-herstøðini í North Carolina. Hann nevndi nóg illa orðið hópoyðingarvápn, men nýtti harafturímóti drúgva tíð til at tosa um frælsi og demokrati í Irak.

- Vit hoyra allar teir irakar, sum leingjast eftir frælsi. Og fólkið í Irak skal hoyra lyfti mítt: Okkara hermenn har fara at halda á, til alt landið hevur fingið frælsi, segði Bush í røðuni.

# Tað gongur tann skeiva vegin í menningarlondunum

**Hvørki bílig arbeiðsmegi ella bílig húsaleiga er nóg mikið til at fáa útlendskar pengamenn til at gera íløgur í teimum fátækastu londunum í Afrika, Asia ella Latínamerika**

MENNINGARLOND

*Árni Joensen*

Tað er niðurstøðan í teirri árligu frágreiðingini hjá Heimsbankanum. Tvørturímóti vísir frágreiðingin, at í dag fara meiri pengar úr menningarlondunum, enn tey fáa ígjøgnum lagalig lán og íløgur, samstundis sum londini rinda meiri í uttanlandsskuld, enn tey fáa inn í nýggjum kapitali.

Ein teirra, sum hava skrivað frágreiðingina, er Uri Dadush, sum starvast á skrivstovuni hjá Heimsbankanum í Rom. Hann sigur, at gongdin er eitt týðiligt tekin um, at virksemið í menningarlondunum er alt ov lítið, til londini kunnu sleppa burtur úr fátækradøminum og skuldartrupulleikunum.

Síðani miðskeiðis í nítiárunum og serstakliga aftan á búskaparkreppuna í Asia hava altjóða bankar verið sera varnir við at lata menningarlondunum privat lán. Uri Dadush sigur, at í fjør vóru útreiðslurnar av gomlu uttanlandsskuldini hjá menningarlondunum níggju milliardir dollarar størri ennn enn tað, sum londini fingu í nýggjum lánum. Samstundis eru tær útlendsku íløgurnar í eitt nú vinnuvirkir minkaðar støðugt seinastu trý árini.

Menningarserfrøðingurin hjá Heimsbankanum væntar, at nógv menningarlond fara at søkka uppaftur longur niður í skuldardýpið tey næstu árini, og hetta verður gongdin, sjálvt um Heimsbankin hevur strikað lán fyri einar 40 milliardir dollarar hjá teimum fátækastu londunum tey seinastu árini. Hetta er heilt einfalt ikki nóg mikið.

- Skuldin bara veksur, tí londunum tørvar pening. Tað hevur ikki borið teimum til at økja inntøkuna við størri útflutningi, og í fleiri førum hevur tað eisini víst seg, at londini fáa minni og minni fyri sínar vørur, sigur Uri Dadush.

### Meiri stuðul neyðugur

Steen Folke, sum arbeiðir á altjóða granskingarstovninum í Keypmannahavn, sigur við Politiken, at tað er serliga óheppið, at tær privatu íløgurnar í menningarlondunum minka, samstundis sum fleiri lond, teirra millum Danmark, hava skert hjálpina til hesi somu londini.

Í fjør fingu menningarlondini 16 milliardir dollarar í almennum lánum umframt 33 milliardir dollarar í stuðuli. Men hetta ger alt ov lítlan mun, tí tørvurin er nógv størri enn so. Úrslitið er, at menningarlondini verða meiri og meiri heft av privatum íløgum, og tær minka eisini. Harafturat hevur tað víst seg at vera sera óheppið, at londini gerast heft av privatum íløgum.

- Nógv tær flestu privatu íløgurnar verða gjørdar í londum og vinnugreinum, sum klára seg væl frammanundan. Tískil fer meginparturin til at menna ídnaðarútbyggingina í teimum kinesisku býunum og ikki til teir afrikansku bøndurnar, har tørvurin er nógv størri, sigur Steen Folke.

Sambært Heimsbankanum eru teir útlendsku íleggjararnir serliga hugaðir at gera íløgur Meksiko og í teimum londunum í Asia, sum eru væl fyri. Latínamerika hevur lítlan áhuga og serliga ikki aftan á búskaparkreppurnar í Argentina og Brasilia, og tey afrikansku londini eru sett fullkomiliga til viks.

- ES og USA hava lovað at økja teirra menningarhjálp 50 prosent tey næstu fimm árini, og nú vóna vit, at stjórnirnar har fara at halda hetta lyftið. Men tað er einki at ivast í, at tað verður neyðugt at minna tær á tað, sigur Uri Dadush á skrivstovuni hjá Heimsbankanum.